# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Jákup Lamhauge, Saltangará:

## 40 ára starvsdag sum havnarmeistari



*1. apríl 2006 hevði Jákup Lamhauge 40 ára starvsdag sum havnarmeistari við Runavíkar havn. Her er tað Jóannes S. Hansen, ið ynskir honum tillukku*



*Havnarmeistarin hjá Tórshavnar kommunu, Jónsvein Lamhauge, var eisini við til móttøkuna*



*Meinhard Bjartalíð spældi nøkur klaverstykkir og Marita Joensen og Johnny Hansen sungu*



*Kaj Leo Johannesen, formaður í sambandsflokkinum, handaði Jákupi heiðursmerki frá Margrethu Drotning í silvuri, og segði hann eisini nøkur orð*



*Jákup fær handaðan ein málning sum gávu*



*Fitt av fólki nýtti høvi til at heilsa upp á Jákup*

**Apríl 2006 hevði Jákup Lamhauge 40 ára starvsdag sum havnarmeistari við Runavíkar havn. Í hesum sambandi skipaði Runavíkar kommuna fyri móttøku fríggjadagin 31. mars.**

### MÓTTØKA

Fitt av fólki nýtti høvi til at heilsa uppá Jákup Lamhauge. Rodmundur Nielsen, borgarstjóri segði nøkur orð. Hann segði m.a., at Jákup Lamhauge hevur aktivur í politikki í mong ár, hann var býráðslimur í 24 ár, harav 8 ár sum býráðsformaður frá 1993 – 2000, og var tað eitt tíðarskeið har flestu kommunur í Føroyum høvdu tað trupult fíggjarliga. Jákup megnaði at stýra kommununi hegnisliga gjøgnum hesi truplu árini, ja Rodmundur helt, at eingin hevði klára hetta betur enn Jákup.

Jákup var í tvey ár formaður í Kommunusamskipan Føroya, frá 1999-2000. Hann varð valdur í nevndina hjá Samhald í Eysturoynni í 1969 og sat út í eitt til 1990 og so aftur í 2002 har hann eisini var eitt skifti. Hann hevur eisini sitið í landsnevndini hjá Sambandsflokkinum í nógv ár. Eisini var hann tinglimur hjá Sambandsflokkinum (1989-1990), sum varamaður fyri Jógvan Ingvard Olsen, meðan hann var landsstýrismaður og eisini verið varamaður í fleiri styttir tíðarskeið.

Jákup hevur altíð verið NSÍ´ari um ein háls. Hann hevur sitið í nevndini hjá NSÍ og eisini í starvsnevndini. Tað var í tíðini, tá NSÍ bæði hevði fótbólt, hondbólt og kappróður, og var tað kanska kappróðurin, ið hevði hansara størsta áhuga tá. Hann er framvegis at síggja á bakkanum í Runavík á hvørjum heimadysti hjá NSÍ.

Jákup fekk handað heiðursmerki frá Margrethu Drotning í silvuri fyri trúgva tænastu og var tað Kaj Leo Johannesen, formaður í sambandsflokkinum, ið handaði Jákupi heiðursmerkið, og segði hann eisini nøkur orð.

Eliesar Kastalag, byggifrøðingur hjá Runavíkar kommunu og Kári P. Højgaard, býráðslimur søgdu einini nøkur orð. Meinhard Bjartalíð spældi nøkur klaverstykki og Marita Joensen og Johnny Hansen sungu.

Í frítíðini fæst Jákup við seyð og hevur hann eisini verið røktingarmaður í Lamba í meira enn 30 ár, eisini hevur hann bát.

## Andlát og jarðarferðir

**Anna Maria Mikkelsen**, vanliga nevnd Mia á Støðini, Syðrugøta, andaðist í heiminum í gjárkvøldið, 100 ára gomul. Kistan fer úr heiminum í Filadelfia hóskvøldið klokkan 19. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Kistan við Jóhan Mørkøre, Hósvík**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin 6. apríl, klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Hósvíkar kirkju fríggjadagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Jóhan, kunnu lata Leguhúsinum í Nesvík eina peningagávu; konta í peningastovnunum.

Kistan við **Hans Jákup Hansen, Tórshavn**, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin 6. apríl kl. 20. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Hans Jákup, kunnu lata eina peningagávu til Frelsunarherin, konta í peningastovnunum.

Kistan við **Dávur Daviden, Nes**, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni fríggjadagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Dáva, kunnu lata eina peningagávu til Vesturskin, konta í peningastovnunum.

Kistan við **Osvald Hansen**, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikudagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Osvald kunnu lata eina gávu til Hoyvíkar kirkju, konto í peningastovnunum.

**Arne Tausen, ættaður úr Hovi**, búsitandi í **Havn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 3. apríl, 83 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum í Havn hósdagin kl. 13. Tey ið ynskja at minnast Arna, kunnu lata eina gávu til Parkinsonfelagið, konta í Føroya Banka.

---

Kunngjørt verður at okkara kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Dávur Davidsen**
Nes

andaðist á Landssjúkrahúsinum 3. apríl, 89 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin kl. 16.00.
Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni fríggjadagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Jensia og Marianna, Anna Helena, Jan og Mathias**

*Tey, ið vilja minnast Dáva, kunnu lata Vesturskini eina peningagávu, konto í peningastovnunum.*

---

**Dagurin í morgin.**

**6. apríl. Sixtus.** Pávi, sum doyði ár 126.